# KUNNGERÐ

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 við seinni broytingum um býarskipanir og byggisamtyktir, hevur Sørvágs bygdaráð á fundi 25. november 2009 samtykt at broyta byggisamtyktina og býarskipanina fyri Sørvágs kommunu.

Broytingin fevnir um matr.nr. 143b, 143c, 200a, 200f, og 200g í Sørvági, sum sambært matriklinum liggja eyf. veg ba.

Bygdaráðið hevur samtykt, at ein serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri matr.nr. 143b, 143c, 200a, 200f, og 200g í Sørvági, har ásettar verða hæddarkotir fyri hvørt einstakt stykki.

Frágreiðing, kort og vegleiðing um kæru liggur frammi á kommunuskrivstovuni til alment eftirlit í tíðarskeiðnum frá fríggjadegnum 27. november til 18. desember 2009 báðir dagar íroknaðir.

Møgulig broytingaruppskot ella mótmæli skulu verða bygdaráðnum í hendi í seinasta lagi 10. januar 2010.

**Sørvágs Kommuna**
www.sorvag.fo
VARÐAGØTA 8 · FO-380 SØRVÁGUR
SORVAG@SORVAG.FO · TEL 363200



*Eitt sindur hugnaligari jólahugni*

Nakrir arbeiðsfelagar, ein nevnd, ein bindiklubbur, ella nøkur sum bara vilja fáa frið til at hugna sær, nú tað stundar til jóla.

Tær góðu umstøðurnar kunnu vit bjóða tykkum.

Royn **Luddastovu** í Leynum ella **Bakkastovu** við Ljósá.

**BOOKING:**
**lp@ognir.fo ella tlf. 21 73 00**
**www.ognir.fo**
**www.wedding.fo**
**sí undir »veitarar« og »brúðarnátt«**

www.sunda.fo

SUNDA KOMMUNA

## Námsfrøðingar til Dagstovnin á Flatinum

**Vit søkja eftir námsfrøðingum til:**

- barnagarðsstovuna á Túvu við 20 børnum í aldrinum 3-5 ár. Starvið er 30 t. pr. viku, fyri námsfrøðing í barnsburðarfarloyvi frá 1 feb. til 15 okt. ´10.
- frítíðarstovuna á Bakka við 18 børnum úr 2. og 3. flokki. Starvið er 20 t. pr. viku, at byrja 1. jan. ´10 ella eftir nærri avtalu.

**Í okkara arbeiði leggja vit dent á:**
Viðurkenning, ymiskleika, tryggleika og nærveru.

Er hetta nakað fyri teg, hevði tað glett okkum at frætt frá tær.

Eisini ber til at fara inn á sunda.fo undir leys størv, og lesa um okkara ynskir, førleikakrøv v.m.

**Setanarviðurskifti:** Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið á lønarstigi 11 – 18.

Um ongin námsfrøðingur søkir, verða hjálparfólk sett tíðaravmarkað.

**Meira fæst at vita:** um størvini við at tosa við Rosu Prestá leiðara á tlf 737247 ella Sólrún Dam varaleiðara á tlf. 737244

**Umsókn** við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin 15 desember 09 og sendast til

**Dagstovnurin á Flatinum**
Skúlavegur 9
400 Oyrarbakka



## Jólagávu hugskot

Audi A4 S-line st.car. 2.0 bensin. 131 hk. Árgang juni 2008. Koyrt 25.000 km. Nógva eykaútgerð, t.d køliskáp, klimaanlegg o.m.a.

Nýprísur 420.000 kr. Jólaprísur 295.000 kr.
**Áhugaði ring á tlf: 568877**

## Søla av línuskipi og/ella avhendan av veiðirættindum/ fiskirættindum

Vegna P/F Klesin í konkurs verður línuskipið m/b »Grani«, kallibókstavir OW2434, BRT 324 og NRT 97 lýst til sølu.

Línuskipið er bygt í 1962 í Fraklandi. Skipið er skrásett sum heimahoyrandi í Klaksvík. Eigari av fiskiskipinum er P/f Klesin í konkurs.

Skipið hevur veiðiloyvi. Felagið hevur í inniverandi fiskiári 147,38 fiskidagar í bólki 3, línuskip yvir 110 tons, íslandsloyvi (143,3 tons, harav 36,6 tons toskur fyri 2009) og fekk útskrivað 35,45 fiskidagar á Føroya Banka seinast hesi loyvi blivu útskrivaði. Tað kann koma uppá tal at avhenda veiðirættindi og/ella fiskirættindi serskilt.

Tað stendur búnum frítt at velja millum innkomin boð, harundir ikki at selja/avhenda.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Inga Højgaard, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tel. 311260 t-post ih@lawfirm.fo (sak nr. 8800409), sum kann geva nærri upplýsingar um skipið, loyvir og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja skipið.

**ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4**
YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 311260 · FAX 311261 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
EMAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO
**HEIMASÍÐA: WWW.LAWFIRM.FO**

TORMÓÐUR DJURHUUS · JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR

## UMSÓKN UM SKEINKILOYVI TIL STØK TILTØK

Umsóknir um skeinkiloyvi til støk tiltøk á jólum og nýggjárinum, skulu verða Loyvisnevndini í hendi innan 15. desember 2009.

**Umsóknir skulu sendast til:**

Politistøðin í Tórshavn
Att. Loyvisnevndin
J. Broncksgøta 17
Postboks 3018
110 Tórshavn

Saman við umsókninni skal sendast ein tekning, sum vísir økið har ætlanin er at skeinkja, tal av skeinkingarstøðum, umframt ein neyv lýsing av tiltakinum, harundir upp- og afturlatingartíðir. Umsóknir sum ikki eru innkomnar innan 15. desember 2009 verða ikki viðgjørdar.

**LOYVISNEVNDIN**
*Bjartur Dalsgarð, form.*